

www.oljan.fo

**Jan Müller** 23 - 11 - 2011

# Oljuprísurin fellur

Eftir hækkingar í gjár er prísurin á ráolju fallin á marknaðunum seionastu nátt og í morgun. Orsøkin er, at búskaparvøksturin í USA er minni enn væntað, og tá USA er heimsins størsta oljukeyparaland, ávirka tíðindini prísin. Í New York fall prísurin á olju, sum skal latast í januar, 1,08 dollara og kom niður á 96,93 dollarar fyri tunnuna. Í London fall prísurin á Brent-oljuni 91 cent og var í morgun beint oman fyri 108 dollarar fyri tunnuna.